sólorka

TÍN VERTUR ÚTI Í VERÐINI

Tryggasta góðalívið sunnanfyri
- beinleiðis úr Vágum







Við útferðum, tónleiki
og tilboðum um nógvar
spennandi familjuaktivitetir







# Heystferian 2022

á sponsku Costa Blanca • 11. – 18. oktober

Tilval

# Dømi um familjuaktivitetir

Læt okkum frætta, um tit hava serlig ynski

sólorka
TÍN VERTUR ÚTI Í VERÐINI

## Fótbóltsskúli

Vit kunnu skipa fyri okkara egna fótbóltsskúla fyri børn og ung við royndum sponskum venjarum. Okkara framtíðar fótbóltshetjur kunnu tekna til fýra dagar í fóltbóltsskúlanum.





## Ríðiskúli ella ríðitúrur

Hava tit áhuga í at ríða, kunnu vit skipa fyri ríðiskúla í vakra Sierra Heleda-økinum skamt frá hotelli okkara. Kom og royn ein dag á rossabaki saman við royndum vegleiðara.

## Kajakk ella paddle

Vit eru við Miðjarahavið.
Møguleikarnir fyri vatnaktivitetum eru næstan óavmarkaðir.
Vit kunnu eitt nú skipa fyri kajakkrógving ella paddling.



## Bivouac Challenge

Øll familjan kann sleppa at royna seg sum skótar í ein dag. Vit læra at seta upp eitt tjald, at knýta knútar, at tendra eitt bál o.m.a. Vit kunnu eisini skipa hetta sum eina kapping.





## Klintrimús

kann sleppa at royna seg í einum spennandi familju-tiltaki stutt frá hotellinum. Góðkendir og royndir instruktørar skipa fyri, og øll vaksin og børn, sum eru 10 ár og eldri, kunnu vera við.

## Svimjing, flogbóltur o.a.

Vit hava eisini nógvar møguleikar heima í Albir Garden – m.a. í svimjihyljunum og í okkara egna vatnlandi.
Á myndini spæla føroyskir ungdómar flogbólt í heystferiuni 2021.



# Nógvir møguleikar í grannalagnum




## Mundomar

er ein djórapark, har børn, ung og vaksin kunnu njóta ymisk sløg av súgdjórum, fuglum og skriðdjórum. Parkin hevur fleiri spennandi framførslur, og viðhvørt ber eisini til at svimja við sjóleyvum og springarum.



## Terra Mitica

Í útryðjuni av Benidorm er stóra stuttleikaparkin við teimum mongu møguleikunum fyri bæði stór og smá, djørv og minni djørv. Stutt og bíligt er at koyra higar í hýruvogni.





## Altea

Gamli grannabýurin er ein hin vakrasti í øllum Spania. Her er hugnaligt at fáa sær ein bita ella ein kaffimunn. Tað ber til at taka býbussin ella ein hýruvogn.



Tilval

# Vakrar útferðir

sólorka
TÍN VERTUR ÚTI Í VERÐINI



## Guadalest

Hálvdagstúrur til eina av mest vitjaðu bygdunum í Spania. Við skansanum á undarligu tindunum er plássið spennandi, og útsýnið oman til Miðjarðarhavið er frálíkt.





## Fonts d'Algar

Hálvdagstúrur til vakra fossalendið, har tað er lagamanni hjá barnafamiljum og ungum at hugna sær, leypa á bláman og svimja – enntá inn um ein av fossunum.





## Valencia

Heildagstúrur til triðjastørsta býin í Spania. Her eru gamli býarparturin, gitni futuristiski lista- og vísindabýurin, Mestalla stadion hjá Valencia CF og nógvir shoppingmøguleikar.



sólorka

TÍN VERTUR ÚTI Í VERÐINI



# Vælkomin útí

Her er ein einastandandi møguleiki at sleppa beinleiðis suður í sólina fyri antin at taka lut í einum ella fleiri av okkara aktivitetum – ella fyri bara at taka tær av løttum.

Kom við flogfari okkara til Alicante og við bussum til hotel okkara í Albir ella Benidorm. Vitjanin er vælegnað til barnafamiljur eins væl og til einstaklingar, pør ella vinir, sum ynskja at sóla sær og hava tað hugnaligt.

Benidorm er ein av størstu feriudeplum í Spania. Sandstrendurnar eru fantastiskar og millum tær allarbestu í øllum landinum. Býurin er bert ein góðan hálvan tíma frá flogvøllinum.

Albir er ein friðarligari, men hugnaligur feriubýur bert 10 minuttir úr Benidorm og 45 minuttir frá flogvøllinum.

Við í prísinum er:
• beinleiðis flogferð t/r • bussur millum flogvøllin og hotellið t/r,
• gisting í 7 nætur við morgundrekka *)
• føroysk ráðgeving og hjálp á staðnum.

*)Til ber at keypa ½ ella fulla pensjón ella 'all-inclusive' afturat.

Harafturat ber til at melda seg til aktivitetir og útferðir fyri lagaligar prísir.


solorka@solorka.com • tlf. 221090
www.solorka.fo


## Albir

Familjur og vaksin



### A Albir Garden Resort & Aquapark

Hetta er heimavøllurin hjá Sólorku og staðið, har tær gitnu vár- og heystseturnar verða hildnar. Kømrini eru í lágum bygningum inni í tí stóra vakra havanum við svimjihyljum og øllum, sum hartil hoyrir. Sum nakað heilt serligt hevur Albir Garden sítt egna vatnland, hagar bert gestirnar á hotellinum hava atgongd.
(www.albirgardenresort.com)





Dømi

**Prísir fyri 7 dg.**

**Vaksin úr kr. 7.935,-**

fyri hvønn, um tvey gista saman.
Eykakostnaður fyri eina-/serkamar

Bið okkum um tilboð til einstaklingar, pør, ella familjur

## Benidorm

Bert vaksin



### B Hotel Agua Azul ****

Hetta hotellið er bert 400 metrar frá teirri frálíku Levante-sandstrondini og samstundis nær við miðdepilin í Benidorm. Tað hevur ein stóran svimjihyl og sólterassu í vakra garðinum. Her ber til at uppliva lívliga dámin á strondini og í best umtókta býarpartinum í Benidorm.
(www.hotelaguazul.com)





Dømi

**Prísir fyri 7 dg.**

**Vaksin úr kr. 8.985,-**

fyri hvønn, um tvey gista saman.
Eykakostnaður fyri eina-/serkamar

Bið okkum um tilboð til einstaklingar, pør, ella bólkar